


týdningarmikið at fara á val sum heild, men at vit mugu skilja tann amerikanska veljaran, tá hann heldur vil sita heima enn at fara á val, av tí at tað kann vera líkamikið, hvønn hann velur, av tí at valevnini eru somikið lík. Hetta, tað ikki at fara á val, kann eisini vera ein góður háttur hjá amerikanska veljaranum at vísa sína ónøgd uppá, tí tá sendir hann eini boð út til amerikanska samfelagið um, at hann vil ikki fara á val, tí at hann hevur ikki nóg breitt úrval at velja ímillum, og hetta er sjálvsagt ein trupulleiki fyri eitthvørt fólkaræðisligt samfelag, tí er tað nakað, sum er týdningarmikið fyri eitt fólkaræðisligt samfelag, so er tað at hava eitt breitt úrval av flokkum at velja ímillum. Hinvegin so meti eg tað vera eitt sera jaligt tekin fyri eitt demokratiskt samfelag, tá veljarar vísa sína ónøgd við ikki at fara á val, tí tað er tann størsta ónøgdin, ein kann vísa móti eini skipan, og eg vildi mett, at tá luttøkan til eitt val í einum demokratiskum samfelag, sum USA nú einaferð er, er niðri á 50 %, so er tað eitt greitt tekin um, at teir einstøku veljararnar eru ónøgdir, og at broyting onkursvegna má til fyri at tekkjast veljarunum, tí er tað nakað, sum eitt demokratiskt samfelag ikki kann tola, so er tað tað, at meira enn helmingurin av veljarunum eru ónøgdir og sita við hús ferð eftir ferð, tá val er á skránni. So tá amerikonsku veljararnir sita við hús, tá val er, so meti eg tað vera eitt jaligt tekin, tí soleiðis kunnu teir gera vart við sína ónøgd, men tá teir ferð eftir ferð sita við hús, tá val er, so hevur amerikanska samfelagið ein trupulleika.

Onkur kann nú siga, at teir amerikonsku veljararnir kunnu gera vart við sína ónøgd við at velja onkran annan flokk, eitt nú hin stóra flokkin, sum teir hava møguleika fyri at velja, men av tí at hesin flokkur til eina og hvørja givna tíð ikki vil vera serliga ólíkur í mun til hin stóra flokkin, so fær veljarin betur gjørt vart við sína ónøgd við at sita heima. Her kunnu vit samanbera við Føroyar, sum hava eina "lutfals-valskipan". Tá ið tann føroyski veljarin er ónøgdur, so velur hann onkran annan flokk, tí í Føroyum er lutfalsliga fleiri flokkar at velja ímillum í mun til USA, og sum hava møguleika til at gera sína rødd galdandi, eftir at val hevur verið á skránni. Tí hevur siðvenjan í Føroyum verið hon, at tá veljararnir eru ónøgdir, so fara teir hóast alt manssterkir á val og velja bara onkran annan ístaðin, meðan tá tann amerikanski veljarin er ónøgdur, so fer hann ikki á val, tí valmøguleikarnir eru ikki eins stórir, av tí at tann politiska mentanin í USA fyri at hava tveir stórar flokkar, sum ráða fyri borgum, er somikið sterk, sum hon nú einaferð er.

Eg havi higartil víst á orsøkir, hví so fáir amerikumenn fara á val. Eg vil tó staðiliga sláa fast, at tað uttan iva eisini eru fleiri aðrar orsøkir til, amerikumenn ikki eru eins raskir at fara á val, sum vit føroyingar og norðurlendingar sum heild eru. M.a. kann tað vera ein orsøk, at amerikanarir heilt einfalt eru ikki áhugaðir í tí, sum gongur fyri seg í Washington og eru kanska meira áhugaðir í teimum lokalu valunum. Tað er jú ikki bara forsetavalið, sum stendur á skránni 4.novembur, men eisini val sum t.d. val av sherifum, val av dómarunum og ákærum, kommunval, val til løggávu tingini í statinum, og so eru eisini fólkaatkvøður um ymiskt, og alt hetta kann gera tað, at fólk heldur hava áhuga fyri hesum valum fram um forsetavalið. Men hetta, tað at tey demokratisku og republikansku valevnini altíð hava verið so lík, og tað, at tað kann gera tað sama, um tú fert á val ella ikki, vil eg pástanda, er ein av høvuðsorsøkunum til, at amerikumenn ikki kenna eina so stóra trongd til at fara á val, og so vil eg vísa á, at tað hóast alt ikki er so stórur munur á førda poltikkinum hjá ávikavist demokratunum og republikanarunum millum ár og dag, og tí er tað óivað onkur amerikumaður, ið hugsar, at tað kann gera tað sama, hvønn eg velji, tí tað verður ikki tann stóri munurin á førda politikkinum hjá tí, sum verður valdur, í mun til tann, sum ikki verður valdur.



## Niðurstøða

Og júst hetta síðsta v.v. tí at republikanararnir og demokratarnir eru rættiliga líkir fari eg at koma nærri inná í næstu greinini. Eg fari at vísa á, at republikanararnir og demokratarnir hava ført rættiliga líkan politikk millum ár og dag, og eg fari serliga at vísa á, at tað er eingin orsøk til hjá okkum føroyingum og vesturevropearum sum heild at hava so stórt sympati fyri demokratunum, sum vit nú einaferð hava lyndi til at hava, tí meðan eg eri samdur við mongum í, at republikanararnir ikki er ein flokkur, sum er verdur at seta sín kross við, so vil eg vísa á, at søgan hevur lært okkum, at demokratarnir heldur ikki er ein flokkur, sum vit skulu hava nakra orsøk at seta okkara kross við fram um nakran av teimum smærru flokkunum í USA. Tó so, so dugi eg at skilja, sum eg eisini havi tosað um í hesi greinini, at teir smærru flokkarnir ikki nakran møguleika at fáa sítt valevni valt inn í tað Hvíta Húsið, og tí fari eg í míni seinnu grein eisini at vísa á, hví eg so heldur hevði valt Obama enn McCain, um eg hevði skulað valt nakran av teimum báðum valevnunum. Í tí fjórðu greinini vendi eg eygunum eitt sindur burtur frá tí, eg havi tosað um í trimum teimum fyrstu greinunum og fari at tosa um "proposition 8" valið, sum hevur nógv størri áhuga í býarpartinum, har eg búgvi, enn hvat forsetavalið hevur. Tað valið snýr seg um, hvørt tað longur skal vera loyvt hjá samkyndum í Kalifornia at gifta seg.